Tit ringja — vit skriva

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!

tíðindablaðið **sosialurin**

Lýsingar:

Lýsingarmaður okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingaspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran.

Nú eru yvir 47.000 fólk á klettunum

Saksun og Mykines (myndin) eru framvegis minstu kommunur
Í Saksun búgva 26 fólk og í Mykinesi 29.

Nú eru yvir 47.000 fólk í Føroyum.

Fólkatalið tann 31. desember 1987 var 47.012.

687 fólk komu afturat talinum í fjør og er hetta meira enn í 1986, tá fólkatalið vaks 563 og í 1985, tá vøksturin var 332 fólk.

Í 1987 fluttu 1700 fólk til Føroya og 1423 fluttu úr landinum.

778 børn blivu fødd í fjør og 368 fólk doyðu.

Í 1986 blivu fødd 790 børn og 743 í 1985.

Annars sæst gongdin í fólkatalinum í Føroyum í 1987 á yvirlitinum hjá Landsfólkayvirlitinum.

hd

Tríðingurin av fólkinum býr á tí, vit kunnu kalla høvuðsstaðarøkið, tað er í Tórshavnar, Argja og Kirkjubøar kommunum. Her búðu 15.888 fólk nýggjársaftan í fjør. Og nýggjársdag 1987 búðu 15.501 fólk í hesum kommunum.

Í Norðoyggjum búðu 6.044 fólk 31. desember 1987 (6.008 1. januar 1987).

Í Eysturoynni 10.392 (10.197).

Í Norðstreymi 3.717 (3.671).

Í Vágum minkaði fólkatalið ífjør úr 2.909 í 2.900.

Í Sandoy 1.671 (1.652) og Suðuroy 5.893 (5.887).

Óli í Áarstovu

Á Brandstøðini í Havn tosa teir ikki um gott ella ringt veður. — Teir tosa um harðveður ella haruveður.

— * —

Meðan eldurin leikaði í týsdagin var av besta haruveðri, men harutiðin er av á hesum sinni.

— * —

LANDSFOLKAYVIRLITIÐ, TORSHAVN — MANNTALSLISTI FYRI 1/1-87 TIL 31/12-87 — DAGF.: 19.01.1988 SIÐA: 1

KOMMUNA	MANNTAL 1/1-87	FLUTT TIL FØROYA	FLUTT ÚR FØROYUM	FLUTT Í KOMM.	FLUTT ÚR KOMM.	FØDD	DEYÐ	MANNTAL 31/12-87
FUGLOYAR	59	0	0	4	6	0	2	55
SVÍNOYAR	61	0	1	2	1	0	1	60
VIÐAREIÐIS	297	4	2	1	3	6	1	302
HVANNASUNDS	451	2	0	14	11	5	3	458
KLAKSVÍKAR	4.920	146	131	98	105	81	34	4.945
KUNOYAR	91	5	0	8	3	2	1	99
MIKLADALS	79	0	0	3	4	0	0	72
HUSA	56	0	0	1	4	1	1	53
OYNDARFJARÐAR	185	10	0	3	9	3	1	191
ELDUVÍKAR	139	0	1	2	5	0	1	134
FUGLAFJARÐAR	1.641	69	48	33	21	24	12	1.684
LEIRVÍKAR	813	25	15	20	17	13	5	834
GØTU	959	29	25	16	16	16	6	973
NES	1.096	34	23	47	19	22	6	1.151
RUNAVÍKAR	2.414	64	77	60	85	30	13	2.393
SJÓAR	928	19	6	32	30	30	7	966
SKÁLA	733	19	11	14	21	8	2	710
EIÐIS	682	25	23	28	16	20	6	710
SUNDA	450	4	6	14	9	8	4	457
FUNNINGS	135	4	0	10	1	2	2	118
GJÁAR	82	1	3	1	8	0	2	71
HALDARSVÍKAR	313	5	1	10	15	6	6	312
SAKSUNAR	26	0	0	0	0	0	0	26
HVALVÍKAR	380	7	4	8	19	4	6	370
HØSVÍKAR	271	11	4	5	13	2	0	272
KOLLAFJARÐAR	849	18	17	45	16	11	6	875
KVÍVÍKAR	533	12	13	29	15	13	5	551
VESTMANNA	1.308	17	21	20	19	18	12	1.311
ARGJA	1.379	66	47	95	98	30	8	1.417
KIRKJUBØAR	169	6	6	18	6	6	0	185
HESTS	63	0	1	2	3	3	0	64
NOLSOYAR	317	8	2	4	2	0	3	322
SANDAVÁGS	754	6	8	22	16	11	11	758
MIÐVÁGS	1.089	20	26	26	25	10	13	1.083
SØRVÁGS	990	31	33	21	20	10	12	987
BIGGJAR	76	0	1	1	3	0	1	72
MYKINES	27	1	0	1	0	1	1	29
SANDS	641	10	7	17	26	14	7	642
SKÚPUNAR	592	17	4	12	16	11	5	607
SKÁLAVÍKAR	228	3	0	16	12	0	4	231
HUSAVÍKAR	191	3	0	7	9	0	1	191
SKÚVOYAR	93	1	0	4	7	3	2	92
HVALBIAR	849	5	16	20	19	15	15	839
TVØRÁRYRAR	2.125	40	30	39	51	39	20	2.142
FAMJINS	136	1	4	2	2	0	2	131
HOVS	153	0	1	16	6	2	2	164
PØRKERIS	353	2	0	18	8	7	4	368
VÁGS	1.712	54	46	26	38	20	20	1.688
SUMBIAR	559	15	4	7	22	9	3	561
TÓRSHAVNAR	13.953	838	757	394	357	254	89	14.286
TILSAMAN	46.325	1700	1423	1263	1263	778	368	47.012

Vestfalskyrrindi

25. januar: Fyrra kvarter

	Suðuroyarfirði		Vestmannasundi		Nólsoyarfirði		Leirvíksfirði	
Dagur	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.
23. jan.	1003	2226	—	1203	0818	2041	1018	2241
24. jan.	1048	2310	0026	1248	0903	2125	1103	2325
25. jan.	1145	—	0110	1345	1000	2236	1200	—